# Vaksnir sjúklingar skulu klára seg sjálvar og børn fáa økt rættindi

**Meginreglan verður, at vaksin fólk fáa ikki longur fylgjara við, tá ið tey mugu uttanlands at fáa serviðgerð. Hinvegin verður aldursmarkið hjá børnum, sum kunnu fáa fylgjara við, hækkað. Men tað fer eisini at bera til at gera undantøk, tá ið umstøðurnar krevja tað**

SERVIÐGERÐ UTTANLANDS
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Føroyskir sjúklingar, sum verða sendir uttanlands at fáa serviðgerð, sleppa nú ikki longur at hava fylgjarar við í sama mun sum higartil.

Ì familju- og heilsumálaráðnum hava tey seinastu tíðina arbeitt við eini nýggjari kunngerð um fylgjarar og Bill Justinussen, landsstýrismaður, sigur, at hendan kunngerðin kemur í gildi fyrsta dagin.

Tað hevur mangan verið frammi, at føroyingar, sum koma soleiðis fyri, at teir verða sendir uttanlands at fáa serviðgerð, hava ógvuliga góðar sømdir at hava fylgjarar við fyri landskassans rokning.

Hetta er bæði ógvuliga dýrt og leggur samstundis eitt sera stórt trýst á Sjúklingahotellið Tórshavn í Keypmannahavn, har talið á gistingum er ógvuliga nógv vaksið hesi seinastu árini, so at hotellið nú mangan stendur at bresta av fólki sum gistir, eisini av fylgjarum.

Landsstýrismaðurin sigur, at tað er ógvuliga ymiskt, hvussu læknarnir hava skilt kunngerðina um at sjúklingar kunnu hava fylgjarar við.

Kunngerðin, sum nú er í gildið, er ikki so eintýtt og hvussu hvør lækni skilir hana, veldst um eyguni, ið lesa.

– Summir læknar hava gingið nágreiniliga eftir lógarinnar bókstavi, men aðrir læknar hava tulkað kunnerðina øðrvísi og eru skjótari at loyva fylgjara við.

– Sostatt kann tað koma fyri, at ein sjúklingur við eini ávísari sjúku, sleppur at hava bæði ein og tveir fylgjarar við, men ein annar sjúklingur í somu støðu, ikki sleppur at hava fylgjara við.



*Nógv teir flestu føroyingarnir, ið verða sjúkir og mugu fáa serviðgerð uttanlands, verða sendir á Ríkissjúkrahúsið. Men játtanin til serviðgerð uttanlands, skal í mest møguligan mun brúkast til sjálva viðgerðina og ikki til ferðing og gisting hjá fylgjarum, sigur landsstýrismaðurin í familju- og heilsumálum*

Bill Justinussen heldur ikki at hetta er rætt og tí verður kunngerðin broytt fyri at geva øllum somu sømdir so frægt sum tilber.

– Talan er um ein almennan kassa og tí mugu vit tryggja, at øll fáa somu sømdir.

Tí kemur nýggj kunngerð í gildið í næstu framtíð, har tað treytirnar fyri at fáa fylgjarar við verða ásettar.

### Vaksin fólk ongan fylgjara

Bill Justinussen sigur, at meginreglan verður, at peningurin, sum Løgtingið á hvørjum ári játtar til serviðgerð uttanlands, skal fyrst og fremst júst brúkast til geva sjúklingum serviðgerð fyri og ikki til ferðaútreiðslur og gisting hjá fylgjarum.

– Og tað sigur seg sjálvt, at jú meiri peningur av játtanini, ið verður brúktur til fylgjarar, jú minni peningur er eftir til læknaliga viðgerð.

Bill Justinussen sigur, at eftir nýggju kunngerðini verður meginreglan tískil tann, at vaksin fólk fáa ikki fylgjara við.

– Vit halda, at tað er fult forsvarligt, at vaksnir sjúklingar yvirhøvur verða sendir avstað einamallir, tí á Hotel Tórshavn er tænastan góð, har útbúnar sjúkrasystrar eru um sjúklingarnar.

Landsstýrismaðurin leggur tó afturat, at hinvegin verða møguleikarnir hjá børnum at fáa fylgjarar við, øktir.

– Sum er, kunnu børn upp til 16 ár, fáa fylgjara við. Eftir nýggju kunngerðini kunnu børn upp til 18 ár, fáa fylgjara við.

Landsstýrismaðurin í familju- og heilsumálum leggur tó dent á, at undan--tøk kunnu altíð gerast, so at børn, undir ávísum umstøðum, kunnu hava meiri enn ein fylgjara við, eitt nú bæði foreldrini.

– Læknaliga kann tað eisini í ávísum førum verða gagnligt fyri sjálva viðgerðina hjá vaksnum fólki at fáa fylgjara við, kanska hjúnafelagan, og undir slíkum umstøðum kunnu eisini undantøk gerast.

### Leiðslan tekur avgerð um hýruvogv

Annars eru eisini broytingar gjørdar í møguleikanum hjá sjúklingum, sum gista á Hotel Tórshavn, at leiga hýruvogn.

Bill Justinussen sigur, at tað skerst ikki burtur, at tað hevur verið ein ávís misnýtsla á hesum øki.

Tí hevur leiðslan a Hotel Tórshavn fingið heimild at meta um, hvør hevur hýruvogn fyri neyðini og, hvør ikki hevur.

– Tað skal gerast eftir eini fakligum metingum og tað er leiðarin skikkaður til, tí hon er sjúkrasystir, sigur landsstýrismaðurin í familju- og trivnaðarmálum.

# Landsskatturin skal lækka og kommunuskatturin kann hækka

**Nú ætlanin er at leggja barnaforsorgina undir kommunurnar, er tað umráðandi at halda fast um lyfti frá samgonguni um at lækka landsskattin, so at borgarin ikki fær eina eykaútreiðslu, sigur formaðurin í Kommunusamskipan Føroya**

BARNAFORSORG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Tað er ógvuliga umráðandi, at samgongan ikki sleppur undan síni lyfti um at lækka landsskattin 0,9 %, tí annars koma fólk at betala meiri í skatti og tað var ikki ætlanin, sigur Jógvan Krosslá, formaður í Kommunusamskipan Føroya*

Nú samgongan ætlar at leggja barnaforsorgina undir kommunurnar at umsita, fer hetta at føra við sær, at kommunurnar fáa eina eyka útreiðslu upp á einar 32 milliónir næsta ár.

Men hetta verður bara á pappírinum, sigur Jógvan Krosslá, formaður í Kommunusamskipan Føroya, KSF.

Hann sigur, at ætlanin er nevniliga at landsskatturin skal lækka samsvarandi. Síðani kunnu kommunurnar hækka kommunuskattin, so samanumtikið verður úrslitið fyri skattaborgaran tað sama.

– Sostatt skuldi hetta ikki ført til nakra eyka útreiðslu fyri skattaborgaran, sigur Jògvan Krosslá.

Hann sigur, at tað er roknað út, at hesar umleið 32 milliónirnar, sum barnaforsorgin væntandi fer at kosta, svarar til 0,9% í landsskattinum.

– Tí er tað avtalan við landsstýrið, at verður barnaforsorgin løgd undir kommununar, skal landsskatturin samstundis lækka 0,9%.

Og Jógvan Krosslá leggur dent á, at hetta hevur als onki við fráboðaða skattalættan at gera.

– Landsskatturin skal lækka 0,9% afturat tí fráboðaða skattalættanum, sigur formaðurin í KSF.

Hann sigur, at samstundis kunnu kommunurnar hvør í sínum lagi hækka 0,9% fyri at fáa roknistykkið at ganga upp, so at tær fáa fíggjað barnaforsorgina.

Men hann vísir samstundis á, at tað stendur til hvørja einstøku kommunu, um hon hækkar skattin ella ikki, tað veldst alt um hvussu støðan hjá hvørjari kommunu er.

Jógvan Krosslá sigur, at tað kemur ikki óvart á kommunurnar, at hetta økið verður lagt undir kommunurnar.

– Tað vistu vit av. Men avleiðingin av tí má vera, at landsskatturin alsamt lækkar í sama mun og at kommunurnar kunnu hækka kommunuskattin, uttan at borgarin merkir tað og kemur at betala meiri í skatti.

Og hann leggur eisini dent á, at í sambandi við at barnaforsorgin verður løgd undir kommunurnar á nýggjárinum, er tað ógvuliga umráðandi at binda samgonguna upp á lyftið um at lækka landsskattin hevsi 0,9 prosentini og at syrgja fyri, at tað verður gjørt, tí annars kemur borgarin at betala meiri í skatti og tað var avgjørt ikki ætlanin.

### Smærri kommunurnar fáa tað trupult

Barnaforsorgin er eitt stórt og umfatandi øki og Jógvan Krosslá ivast ikki í, at tað verður ógvuliga trupult hjá teimum smærru kommununum at umsita økið.

Tí heldur hann, at smáar kommunur mugu í minsta lagi ger avtalur við størri kommunur um at umsita økið.

– Tað fer at krevja umsiting, sum kommunurnar mugu fáa sær. Megna kommunurnar ikki sjálvar at skipa eina umsiting, mugu tær í minsta lagi hava eina umsiting at vísa á. Kommunur kunnu eisini keypa sær servitan.

Og formaðurin í KSF leggur eisini dent á, at skal økið leggjast undir kommunurnar, skulu kommunurnar eisini veruliga umsita økið. Tað skal ikki bara vera eitt eiti, har gjaldsstovan í veruleikanum umsitur økið og bara sendir kommununum rokning.

– Ábyrgdarbýtið ímillum land og kommunu skal verða púra greitt og tað skulu verða kommunurnar sjálvar, sum hava myndugleikan.

Hann sigur, at sjálvsagt verða nakrar rammur, sum kommunurnar skulu halda seg innanfyri, men tað kemur uttan iva at vera munur á, hvussu høgt, hvør kommuna fer at raðfesta hetta økið, so at summar kommunur koma at veita eina betri tænastu, enn tær í veruleikanum fáa skyldu til eftir lógini.

Men tað er onki nýtt, tí tað er í so nógvum førum, at tænastan til borgaran er ymisk, eisini á økjum, sum eru undir landinum, sigur formaðurin í KSF.





*Fólkatingið varð sett týsdagin, og tá gjørdi danski forsætisráðharrin greitt, at hann ynskti at varðveita Føroyar í danska ríkinum. Samstundis kunngjørdi hann, at yvirtøkulógin verður løgd fram komandi tingsetuna*

# Frælsi og ábyrgd fylgjast

**At føroyingar ynskja frælsi er sjálvsagt. Í hesum anda verður ein yvirtøkulóg framd í komandi tingsetu, sum er slóðbrótandi, men stjórnin ynskir enn sum áður, at ríkisfelagsskapurin verður óbroyttur, segði danski forsætisráðharrin á Fólkatingi týsdagin. Tórbjørn Jacobsen, fólkatingsmaður, kallar røðuna eina andsøgn og ivast í yvirtøkulógini**

FÓLKATINGSSETAN
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Í summum førum var tað sum at hoyra gamla forsætisráðharran, men í øðrum førum ljóðaði hann sum fullveldisvongurin í Føroyum. Harvið prógvaði hann, at hann meistrar at sigla millum vandaskerini, sum onkuntíð eru millum londini í ríkisfelagsskapinum.

Frælsi og ábyrgd eru lyklaorð fyri stjórnina – eisini í ríkisfelagsskapinum, segði Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, tá Fólkatingið varð sett týsdagin.

– Tað er sjálvsagt, at eitt fólk roynir at menna sín egna samleika. Tað er sjálvsagt, at eitt fólk vil avgera sína egnu lagnu. Tað er sjálvsagt, at eitt fólk vil ráða sær sjálvum sum mest. Og tað er eisini tað besta, at avgerðir verða tiknar so tætt við tey fólkini, sum tær viðkoma, segði Anders Fogh Rasmussen.

Tí er stjórnin eisini sinnað at ganga ynskjunum hjá bæði Grønlandi og Føroyum á møti um at yvirtaka fleiri málsøki. Men afturvið frælsinum fylgir ábyrgdin, og tað merkir minni stuðul úr Danmark og størri evni at vinna pening sjálv, segði Fogh.

> ” *Tað er sjálvsagt, at eitt fólk roynir at menna sín egna samleika. Tað er sjálvsagt, at eitt fólk vil avgera sína egnu lagnu. Tað er sjálvsagt, at eitt fólk vil ráða sær sjálvum sum mest. Og tað er eisini tað besta, at avgerðir verða tiknar tætt við fólkini, sum tær viðkoma*
>
> *Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri*

### Slóðbrótandi lóg

Anders Fogh Rasmussen kallaði yvirtøkulógina, sum verður løgd fram í komandi fólkatings- og løgtingssetuni, slóðbrótandi. Epokegørende. Stjórnin fer í samsvari við avtaluna, sum løgmaður og forsætisráðharrin undirskrivaðu á Tvøroyri, at skjóta upp eina lóg, sum gevur Føroyum møguleika at yvirtaka eina røð av nýggjum ábyrgdarøkjum. Forsætisráðharrin heilsaði eisini sjálvstýrisynskjunum í Grønlandi vælkomnum. Grønlendska sjálvstýrisnevndin hevur skrivað álit, sum leggur upp til nýskipan av grønlendsku viðurskiftunum við Danmark.

Eftir øll orðini, sum gingu landsstýrinum í Føroyum og Grønlandi á møti, kom so beinleiðis talan um, at danska stjórnin kortini heldur tað vera best, um ríkisfelagsskapurin heldur fram í verandi líki.

– Vit føla, at tað eru so sterk søgulig, mentanarlig og persónlig bond millum Føroyar, Grønland og Danmark, at framhaldandi samhald innan fyri ríkisfelagsskapin er tað náttúrliga. Men ríkisfelagsskapurin er ikki tvingsil. Og hann má ikki verða ein spennitroyggja. Vit skulu áhaldandi endurnýggja ríkisfelagsskapin í samsvari við tíðina, segði Anders Fogh Rasmussen í sínari setanarrøðu í Fólkatinginum týsdagin.

### Ivast í yvirtøkulóg

Føroyski fólkatingslimurin, sum er mest í andstøðu til danska forsætisráðharran, hoyrdi lítið nýtt í røðuni og helt hana vera eina andsøgn.

> ” *Hann segði tað, sum ein og hvør danskur forsætisráðharri fer at siga til eina og hvørja tíð. Føroyingar mugu gera upp við seg sjálvar, hvat teir vilja, segði hann, men samstundis ynskti hann Føroyar og Grønland í ríkinum*
>
> *Tórbjørn Jacobsen, fólkatingsmaður*

– Hann segði tað, sum ein og hvør danskur forsætisráðharri fer at siga til eina og hvørja tíð. Føroyingar mugu gera upp við seg sjálvar, hvat teir vilja, segði hann, men samstundis ynskti hann Føroyar og Grønland í ríkinum. Tað helt hann vera náttúrligt, men tað stóð í logandi andsøgn við alt tað, hann annars segði um at standa á egnum beinum, frísinni og frælsi. Hann letst at vera liberalur, men hann er bundin av donskum statsáhugamálum, tá tað kemur til stykkis, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Samstundis er Tórbjørn Jacobsen farin at ivast í yvirtøkulógini, sum løgmaður og forsætisráðharrin rósa til skýggja. Fólkatingsmaður Tjóðveldisfloksins er farin at óttast fyri innihaldinum og ætlar sær í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina í Føroyum at spyrja nærri til lógina.

– Hvar er substansurin? Tað kundi eg hugsað mær at vita. Trupulleikin er, at føroyingar eftir øllum at døma ikki eru samdir um, hvat skal standa í yvirtøkulógini, og okkurt bendir á, at onkur flokkur hevur trupulleikar av eitt nú løgregluni. Tað er forkastiligt, um ein sjálvstýrissamgonga í Føroyum ikki so frægt sum megnar at semjast um ein yvirskipaða yvirtøkulóg, sigur Tórbjørn Jacobsen.

# Tey sjey góðu árini eru av

**Tey góðu árini í føroyska búskapinum eru av, og tað sást aftur í fíggjarlógarviðgerðini fyri 2004, sum fór av bakkastokki mikumorgunin**

FÍGGJARLÓG 2004
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Løgtingið fór undir at viðgera Fíggjarlógina fyri 2004 fyrrapartin mikudagin. Hergeir Nielsen, varatingformaður, setti tingfundin klokkan fimm minuttir yvir tíggju, og óivað heldur hon fram til fríggjadagin. Fyrsti røðarin legði hart út.

– Eg fari inniliga at heita á samgonguna at hugsa líka nógv um føroyska búskapin, sum hon hevur hugsað um fullveldi. Føroyski búskapurin hevur stórar trupulleikar og er prógv fyri, at samgongan hevur spælt fallit. Tekur samgongan sær ikki um reiggj, so er stórur vandi fyri, at samfelagið kollsiglir, segði fyrstu røðarin Jóhan Dahl.

Helst var tað startskotið til eina harðliga fíggjarlógarviðgerð. Kanska ta harðastu í nógv ár. Tí, sum Jóhan Dahl segði, tey sjey góðu árini í føroyska búskapinum eru av, og nú skal sjón fáast fyri søgn, um landsstýrið megnar at stýra í truplari tíðum.

Jóhan Dahl legði ikki fingrarnar ímillum og segði, at makan til sminkað lík skal ein leita leingi eftir. Tónarnir broyttust, tá Kristina Háfoss, framsøgufólk fyri Tjóðveldisflokkin, tók yvir. Vilhelm Johannesen var framsøgumaður fyri Javnaðarflokkin, Óli Breckmann fyri Fólkaflokkin, Jenis av Rana fyri Miðflokkin og Kári P. Højgaard fyri Sjálvstýrisflokkin.

Annars vísir fíggjarlógin fyri 2004 eitt avlop á 100 milliónir krónur. Tað er kortini áðrenn avdráttir av skuldini.